*Óli Heinesen, stjóri á Toll- og Skatt:*

# Innheintingin á veg út í økini

*Stjórin á Toll- og Skattstovuni vísir aftur, at leiðarin fyri innkrevjingini hevur sagt upp og hann sigur samstundis, at arbeiði við at leggja innheintingina út til økini er væl á veg. – Tað gongur sína gongd. Tey fyrstu starvsfólkini eru flutt undir økini, sigur Óli Heinesen, sum heldur gongdina í trætuni við Starvsmannafelagið vera sera óhepna*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fríggjdagin frættist, at rættuligt rumbul var í á Innkrevjingardeildini hjá Tolli- og Skatti.

Søgur gingu um, at fleiri enn tey sjey, sum høvdu sagt upp frammanundan, høvdu sagt upp, men tað var heldur enn ikki torført at fáa søgurnar váttaðar.

### Sjey er nóg mikið

Ikki fyrr enn fyrrapartin mánadagin eydnaðist at fáa orð á stjóran á Toll- og Skattstovuni og hann afturvísti øllum søgunum.

– Eg havi eisini hoyrt hasar søgurnar, men kann bert siga, at einki er í teimum. Eingin hevur sagt upp afturat teimum, sum longu eru farin, sigur stjórin.

– Men, leggur hann afturat, leiðarin, sum ein partur av starvsfólkinum hevur funnist at, er farin til hús, men tað er tí, at hon ikki meir orkaði at standa ímóti ákærunum. Í veruleikanum er tað ótrúligt, at hon hevur verið við so leingi, men nú kunnu vit siga, at starvsfólkið náddi málinum.

*Tá leiðarin er farin til hús, er so ein møguleiki fyri at starvsfólkið, sum hevur sagt upp, verður sett aftur?*

– Nei, tað kemur ikki upp á tal. Tey hava sagt seg sjálvan úr starvi av tí at tey vóru ónøgd við leiðsluna og so er ikki meira at gera við tað. Tey vera ikki sett aftur, sigur Óli Heinesen.

Tað at deildarleiðarin er farin til hús hevur einki við sjálva innkrevjingina at gera. Hon er farin heim, tí hon ikki kláraði at standa ímóti trýstinum, sum hevur ligið á henni, men tað var ætlanin, at hon skuldi vera fakligur leiðari fyri allari innkrevjingini og sita í stýrinum.

– Ætlanin er, at hon skal í stýrið at arbeiða at taka sær av uppgávum og tann ætlanin heldur fram, sigur Óli.

### EDV-skipanin haltar

Óli Heinesen sigur, at arbeiði við innkrevjingarskipanini er vorðið tarnað av at edvskipanin ikki hevur verið tøk til tíðina.

– Skipanin er føroysk og tað hevur í hesum føri havt vansar við sær fyri okkum.



Mótrokningin koyrir og skipanin, sum skal stýra eykatrekkinum verður klár um eina viku, men tað eru aðrir partar, sum enn ikki eru lidnir og tað hevur seinkað okkum, sigur Óli Heinesen.

Men størsti trupulleikin er avtaluskipanin, sum ikki enn er fingin upp á pláss.

– Har hava vit enn nakrar praktiskar trupulleikar, tí tað ber ikki til bara at gera avtalur. Tær skulu setast í gildi við undirskrivt og avtalurnar skulu kunna prógvast, og har hava vit ikki funnið eina nøktandi loysn enn, sigur Óli Heinesen.

### Flytingar av starvsfólki

Nú tey sjey starvsfólkini hava sagt upp, so er ein upplagdur spurningur, hvussu verður við innkrevjingarskipanini framyvir.

*– Einki starvsfólk hevur sagt upp, men deildarleiðarin er hoknað undir trýstinum og farin til hús eina tíð. Og arbeiði við at leggja út til økini heldur á, sigur Óli Heinesen*

– Tað verður, sum vit alla tíðina hava ætlað. Hon verður løgd út á økini, sigur hann.

*Men koma tit ikki at mangla fólk úti í økjunum, nú sjey fólk ikki longur eru við?*

– Nei, tað koma vit ikki. Uppgávurnar vera lagdar út, og fólkið, sum er í økinum verður sett at taka sær av teimum, sigur Óli.

*Hava tit tøkt fólk runt landið?*

– Ja, tað hava vit. Vit hava verið ígjøgnum rættiliga stórar umleggingar og tað hevur havt við sær, at fólk ikki hava eins nógv at taka sær av, sum tey høvdu áðrenn. Tí er tað eingin trupulleiki, sigur Óli.

Hann staðfestir enn einaferð, at tey fólkini, sum hava sagt seg úr starvi, hava gjørt tað av egnum vilja, og tí vera tey ikki sett aftur,

Hann útihýsir kortini ikki møguleikanum fyri, at tey trý, sum hava sagt upp, og sum enn eru til arbeiðis, møguliga kunnu verða sett aftur, men tað vil tíðin vísa, tí hann skal tosa við tey fyrst, sigur hann.

# – Tað goysir um eitt korter

*Hesi vóru boðini íslendingar fingu leygardagin tá teir lurtaðu eftir útvarpinum. Hekla var um at fara at goysa og fyri fyrstu ferð nakrantíð bar til hjá jarðfrøðingum at siga tað áðrenn tað hendi. Gosið er longu minkað nógv*

SVEINUR TRÓNDARSON

Leygardagin tók íslendska gosfjallið Hekla at goysa. Hesaferð kom tað ikki óvart á íslendingar kortini, tí fyri fyrstu ferð nakrantíð, vistu jarðfrøðingarnir av tí áðrenn tað tók at rúka úr fjallinum.

– Tað fer at goysa úr Heklu um eitt korter ella so, segði tíðindamaðurin í útvarpinum og hann var ikki langt av leið.

Tveir tíðindamenn vóru á veg úr Reykjavík til Akureyrar tá boðini bórust og teir løgdu leiðina fram við Heklu. Tí bar til hjá teimum at fáa myndir av gosinum. Myndir, sum fá hava tikið undan teimum.

Sosialurin hevur frætt úr Íslandi, at tað gekk stutt tíð, so var ikki hugsingur um at fara nærhendis fjallinum.

### Byrjaði ógvusliga

– Tá tað byrjaði sá tað út til at fara at gerast eitt av teimum heilt stóru gosunum, men longu sunnudagin minkaði tað rættuliga fitt og í nátt minkaði tað aftur, sigur Marentsa Poulsen, sum býr í Reykjavík.

Hon hevur, sum allir aðrir íslendingar fylgt við gosinum, sum ikki kom so óvart á íslendingar kortini

### Tíggju ár ímillum

Tað er ikki ókent, at tað ganga júst tíggju ár ímillum hvørja ferð Hekla goysir.

Kortini vil íslendskur jarðfrøðingur verða við, at júst hetta millumbili er tað stytsta nakrantíð, tí tað eru ikki gingin meiri enn níggju ár síðani tað goysti úr Heklu seinast.

Sum nevnt bar hesaferð til hjá íslendsku jarðfrøðingunum at siga áðrenn at tað fór at goysa, og til tað er tað ein heilt serlig frágreiðing.

Íslendingar ganga nevniliga og bíða eftir tí stóra Suðurlandsgosinum, sum, sambært serfrøðingum, kann koma nær tað skal vera og skulu vit trúgva teimum, so er ikki ráðiligt at vera nærhendis tá tað gosið kemur.

Skrásetingarnar skulu geva íslendingum ein kjans at sleppa burtur úr økinum í góðari tí, so at mannalív ikki farast í gosunum og hóast tað ikki býr fólk í økinum við Heklu, so virkaði goseftirlitsskipanin so væl at íslendingar vistu tað eitt korter áðrenn.

### Turistgos

Nú tað gekk so skjótt at Heklugosið minkaði burtur í einki siga íslendingar, at hetta var eitt turistgos.

Bilrøirnar á vegnum móti Heklu bera eisini á tað borðið, tí sunnudagin vóru bilrøðirnar heilar 4 kilometrar tá tær vóru longstar.

Meðan bilrøðirnar vóru upp á tað longsta brendi hann á við ódnarveðrið, sum menn ikki hava vita um í Íslandi í longri tíð.

Heili 1500 fólk sótu innistongd í bilum sínum á veg móti Heklu, og tey slupp hvørki aftur ella fram.

Ein stór fjøld av bjargingarfólki var úti til arbeiðis sunnukvøldið og úr íslendsku fjølmiðlunum frættist, at ikki síðani tað tóka at goysa í Vestmannaoyggjunum í januar í 1993, hevur so stórt bjargingar tiltak verið í Íslandi.

Í heila tikið er byrjanin upp á nýggja túsundára skeiðið ikki farin serliga við grannum okkara fyri vestan.

Fyri ikki so langari tíð síðani hendi størsta bilvanlukka í íslendsku søguni, síðani tók Hekla at goysa og sum ikki tað var nóg mikið, so kom stóra ódnarveðrið upp í leikin eisini.

### Forsetin var og hugdi

Sunnudagin var íslendski forsetin Ólavur Ragnar Grímsson, unnusta hansara, Dorit og forsætisráðharrin Dávíd Oddsson og hugdu at gosfjallinum, men sýnið var ikki serliga gott.

Harafturímóti fingu íslendingar yvirhøvur nakað at tosað um, tí tá fjølmiðlarnir tosaðu við unnustuna hjá forsetanum um gosfjallið, svaraði hon teimum partvís á íslendskum.

So nú er løtan gloymd, tá íslendsku miðlarnir ætlaðu at gera eina gølu burturúr, at forsetin hevði funnið eina unnustu, so stutt eftir at kona hansara varð farin hiðani.

Hon doyði fyri ikki so langari tíð síðani av krabbameini.

# Kundi verið handfarin øðrvísi

*Stjórin á Tolli- og Skatti er ikki ósamdur við formannin í Starvsmannafelagnum um at ósemjan ikki var rætt handfarin frá byrjan*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað er lítið vit hava hoyrt til Óla Heinesen í sambandi við ósemjuna á Innkrevjingardeildini hjá Tolli- og Skatti.

Hóast hann hevur ábyrgdina fyri stovninum, so hevur hann ikki sagt stórvegis.

Í seinastu viku segði Gunnleivur Dalsgarð, at hann helt ikki, at ósemjan á deildini var taklað rætt, tí í veruleikanum var tann grundleggjandi ósemjan ongantíð loyst.

Nú nakað er fráliðið, spyrja vit Óla Heinesen sama spurning.

*Er trupulleikin kanska tann, at tann upprunaliga semjan ongantíð er loyst, men at ov stórur dentur er lagdur á tann fakliga partin?*

– Tað er ikki óhugsandi. Málið gjørdist so persónligt frá byrjan og tað gjørdi ikki støðuna betri, at Starvsmannafelagið kom við eini ákoyring upp á 23 síður móti deildarleiðaranum. Eftir tað var tað so sera torført, at fáa loyst tann veruliga trupulleikan, sigur Óli Heinesen.

Hann sigur, at hann framhaldandi arbeiðir fyri eini loysn, men tað gerst alsamt torførari, sum tíðin líður.

–Eitt skal mann so hava í huganum afturat og tað er, at tað er trupult at gera eina semju um persónligar spurningar um ikki persónarnir eru við í semjuni, og tað hevur semjan ikki fyrilit við. Hann leggur tó eina við, at Toll- og Skatt hevur lagt doyðin á, at arbeiða eftir semjuni, hóast Starvsmannafelagið roynir at siga nakað annað. Um tað eydnast má tíðin vísa




# Riggar tú til fisk ?



...vit søkja eftir 20 ungum kvinnum og monnum, ið skulu mynda føroyska fiskivinnu komandi árini.

**Eitt sindur um teg**

Tú ert púra vitandi um, at Føroyar hava brúk fyri tær. Tað sæst ikki á skræðuni, men tú hevur eitt brennandi ynski um at taka lut í at ávirka framtíðina í Føroyum.

**Eitt sindur um okkum**

Vit bjóða eina spennandi útbúgving, ið tekur støði í veruleikanum. Tað, tú lærir, kanst tú brúka, og tey, ið undirvísa, eru fólk í lyklastørvum í føroysku fiskivinnuni.

**Fiskivinnuskúlin bjóðar tvinnar útbúgvingar**

- 2 ára vinnurættað útbúgving (AIF), ið gevur beinleiðis atgongd til arbeiðsmarknaðin ella tøkniligar útbúgvingar á matvøruøkinum.

- 3 ára yrkisgymnasial útbúgving (HIF). At ein útbúgving er yrkisgymnasial merkir, at hon gevur atgongd til hægri útbúgvingar.

**Ring 424573 og bið um umsóknarblað.**



## Fiskivinnuskúlin í Vestmanna

**Postrúm 96 - 350 Vestmanna - Tlf. 42 45 73/42 44 96 - Fax 42 44 28**
**www. fiskvest.fo - Teldupostur: fiskvest@fiskvest.fo**

stephanssons hús